# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sorgarleikurin

Krígsatgerðirnar í Gazageiranum eru einki minni enn ein altjóða sorgarleikur við djúpum søguligum røtrum. Í ártíggjur bardist Ísrael við Fatahfelagskapin. Hesin felagsskapur var sekulerur og hevði einki at gera við átrúnaðarliga fundamentalismu. Tað bar tí til hjá Arafat, ið var gitni leiðarin í Fatah at sleppa yvirgangsvirkseminum og taka til politiskar loysnir, tá umstøðurnar langt um leingi vórðu til hetta. Eftirmaður Arafats Mahmud Abbas hevur hildið somu politisku kós og hevur dugað væl at fáa búskaparliga og humanitera hjálp til sína hart plágaðu tjóð.

Men Abbas gjørdist ov moderatur og hóvligur til ta vaksandi fundamentalismuna, og eitt úrslitið gjørdist, at tað átrúnalarliga grundaða Hamas vann valið í palestinsku sjálvstýrsiøkjunum. Harvið fekk Ísrael uppaftur ein fígginda. Sjálvstýrisøkini klovnaðu í ein Fatah stýrdan Vestara áarbakka og ein Hamastýrdan Gazageira, har meira enn ein millión fólk búleikast í lítlum øki. Hamas viðurkennir ikki statin Ísrael, eins og Fatah eftir mong stríðsár hevur gjørt. Hetta hevur elvt til eitt standandi stríð millum Hamas og Ísrael, har hvørgin parturin hevur verið mjúkur ella hevur vandað sær um vápnini. Eftir eina skroypiliga vápnahvíld, sum gekk út á nýggjárinum tók Hamas uppaftur rakettálopini á Ísrael. Hernaðarliga eru hesi raketálop fyri nálastingir at rokna og skaðin av teimum er avmarkaður. Men politiskt kann Ísrael ikki liva við hesum, tí álopini hava sera óhepna ávirkan á almenna huglagið. Hetta er óheppið við atliti at valinum, sum verður um ein mánaða. Hartil kemur, at Obama tekur við tann 20. januar í USA og hansara stjórn ferikki at geva Ísrael eins fríar hendur og Bush hevur gjørt. Sorgarleikurin stendur við og versnar.

Tað er skiljandi, at Ísrael hevur mist tolið og tekur til eitt hernaðarligt andsvar eftir øll rakettálopini og í vónini um at noyða Hamas at viðurkenna Ísrael við samráðingarborðið. Men rakettálopini kunnu á ongan hátt nýtast sum grundgeving og undanførsla fyri tí ræðuliga og framúr ógvusliga harnaðartiltaki, ið Ísrael setti í verk fyri fjúrtan døgum síðani. Álopið er fullkomuliga úti av lutfalli við orsøkirnar. Loftálopini raka púra tilvildarliga, offrini eru kvinnur, børn og gomul, sjúkrahús og skúlar. Vápnini eru mangan slík, sum ikki eru loyvd sambært altjóða sáttmálar eins og streym, vatn og gassveitingar eru avstongdar. Humaniter hjálp sleppur bert í avmarkaðan mun inn í Gazageiran og menniskjansligi sorgarleikurin er mestsum fullkomin. Tað er einki, ið kann verja eina slíka framferð, ið ber við brotsverk móti mannaættini. Hetta fer at koma Ísrael aftur um brekkur, og friðartilgongdin er sett ár aftur í tíðina. Nú sita partarnir tó við samráðingarborðið í Cairo, men smátt gongur. Heimurin setur sítt álit á tann mann, sum tekur við forsetastarvinum í USA í næstum. Kanska megnar hann at bróta hesa ræðuligu ringrás av yvirgangi og kríggi, sum hevur eyðkent Palestina seinastu sekti árini.

**Sosialurin**

## Landið eigur ikki Koltur eina – svar til Símun Mittún



**HEÐIN D. POULSEN**

Í desember hevði Símun Mittún lesarabræv í bløðunum um at friða Koltur.

Eitt áhugavert og spennandi hugskot, sum allarhelst hevði kunnað tænt nógvum almennum endamálum, eitt nú tí siðsøguliga og eisini innan gransking, ferðavinnu og ikki minst innan umhvørvið.

Tíverri er Koltur eitt av teimum mongu málunum, ið løgtingið ikki hevur tímað at givið sær stórvegis far um og við nýggju lóg um landsjørð, so verður tað ein dýrur umgangur, um Koltur skal friðast.

Við nýggju lógini um landsjørð, sum Bjarni Djurholm so beinasamur bar niðan í løgtingið, komu allir festarar at eiga festubrøvini teir sótu við. Í mun til gomlu lógina, er tað nú festarin og ikki eigarin (landið), sum avgerð hvør yvirtekur festið.

Nú Bjørn Patursson, festari í Koltri, er vorðin stjóri yvir allari tí almennu jørðini og ætlar sær, eftir øllum at døma, at gevast í Koltri, er tað hann sum festari, ikki sum stjóri, sum avgerð hvør fær festið eftir hann.

Fær og fær, tað er allarhelst nakað nógv sagt, tí tað sum festarin ger sambært lógini er, at "avhenda" festiðbrævið til ein annan. Heitið "avhending" verður nýtt í lógini, nakað sum jólapynt í køsti, fyri at hugna um ein annars skitnan veruleika.

Tí veruleikin er tann, at tann sum sat við einum festibrævi - tann dagin lógin kom í gildi - kann selja festubrævið til hægst bjóðandi. Ein avmarking er, og hon er, at keyparin, ella tann sum situr hinumegin avhendingingina, skal hava kunnleika til landbúnað.

Sum dóttir mín Anna Maria plagar at siga, eitt gott hugskot, men tíverri nakað sum valla ber til longur, tí nýtslurætturin til almennu jørðina er givin burtur, ein gáva frá landinum til nøkur fá. Nýtslurætturin er ein vardur rættur og skal landið taka nýtslurættin aftur, ella á annan hátt, avmarka nýtslurættin, skal landið rinda endurgjald, tá einhvør avmarking í nýtslurættinum verður at rokna sum ognartøka.

Eins og við fiskiloyvum er skipanin so snildisliga gjørd, at tann, sum gevst og fer úr vinnuni fær nógvar pengar, meðan tann dugnaligi, sum heldur fram og tekur tøk, má gjalda gildið.

Er festarin í Koltri í ivi um støðu sína, kann hann altíð spyrja stjóran á búnaðarstovuni – ella formannin í bóndafelagnum! Tí fólkaflokkurin hevur nú yvirgingið seg sjálvan – í hesum máli situr sami maður ikki bara báðumegin borðið, men á øllum trimum síðum.

## Hvar skal skerjast?



**LEILA SOLMUNDE**
forkvinna í MBF

Nú í vit akkurát eru komin inn í nýggja árið og kjak tykist koma í, hvussu vit skulu bøta um stóra hallið á fíggjarlógini, og eitt mál um bústaðarskatt somuleiðis er komið undan kavi, er Løgtingsmaðurin Gerhard Lognberg veruliga farin at høgga til høgru og vinstru eftir almennu stovnunum og fyrisiting. Hann sigur í lesarabrævið " at fleiri stovnar kundi verið skornir við helvt."

Kanska kundi Gerhard meira nágreiniliga sagt, hvønn almennan stovn hann kundi hugsa sær at mann spardi niður í helvt ella so.

Vit sum virka í MBF vóna ikki, at teir almennu stovnar sum vit dagliga draga nyttu av skulu koma undir henda so sveiggjandi spariknívin hjá Gerhardi.

Eg kann nevna dømir um, hvussu vit síggja nakrar av stovnunum sum vit samstarva við. Eitt nú Almannaráðið, sum skal umsita ein sera stóran part av landsins fíggjarlóg, men sum eru so undirmannaði, at nógvar lógir og reglur sum skulu tryggja nøktandi kor fyri fólk, ið eru sjúk ella hava brek, als ikki kunnu gerast, tí so stórt trot er á fakfólki.

Somuleiðis Almannastovan sum eisini hevur samskifti við túsundtals føroyingar, virkar undir stórum starvsfólkatrotið. Kanska átti Gerhard at sett seg inn í, hvussu nógv mál Almannastovan viðgerð árliga, og hvussu umfatandi tænastan er. Tað snýr seg ikki bara at útgjalda pensjónir og tílíkt sum hesin stovnur skal taka sær av. Nei, her eru túsundtals uppgávur at taka sær av. Eg vóni ikki at tað er meint við at hesir stovnar skulu skerast meiri, tí tað eru teir sum skulu tryggja okkum mongu sum hava sjúku og brek nøktandi vælferð.

Sjúkrahúsverkið er eisini ein almennur stovnur, eg rokni ikki við at nógv kann sparast har. Heimahjálpin sum er skorin inn á bein, hon er eisini ein almenn tænasta, og eg rokni heldur ikki við at har er nógv at skerja.

Nei Gerhard, gev okkum heldur meiri ítøkilig dømi um, hvar tú ynskir at sparast skal, og hvørjar stovnar sum tú sært verða óneyðugar, tað skyldar tú at geva okkum eina forkláring uppá, so vit sum hava brúk fyri almennum tænastum, kunnu føla okkum trygg í 2009, tí nokk er skert á okkara øki.

Síðani til bústaðarskattin, tak tann spurningin fyri seg, og ikki blanda tingini saman.

**Við nýggjárskvøðu**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.